Vikuskiftis Sosialurin


## Blå Danmark í Miðlahúsinum

Mánadagin kemur ein sokallað útbúgvingar-karavan til Føroya. Talan er um »Det Blå Danmark«, sum er ein roynd at fáa ung fólk inn í donsku sjóvinnuna. Mánakvøldið 26. mars klokkan 20 er karavanin í Miðlahúsinum í Vágsbotni, týsdagin 27. mars at hoyra í morgunsendingini í Útvarpinum, klokkan 10 í Kommunuskúlanum í Havn og frá klokkan 14.45 í Tvøroyar Skúla og klokkan 20 í Miðnámsskúlanum í Vági. Mikudagin klokkan 14 á Tekniska Skúla í Klaksvík og klokkan 20 á Studentaskúlanum í Kambsdali. Hósdagin klokkan 08 á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og klokkan 14.30 á Vinnuháskúlanum í Havn.




# Jákup Petersen úr vón og viti – í f ákærum móti sjúkrahúsverkinu



HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður



So nógvir grovir feilir eru í greinunum, sum Jákup Petersen, yvirlækni hevur fylt Sosialin við í seinastu viku, at einki høpi er í nøkrum. Vónandi kann hetta rættast, so Føroya fólk ikki situr eftir við eini fullkomuliga skeivari mynd av tí føroyska sjúkrahúsverkinum.

### 1. Skeiv útreiðslutøl

Við stórum yvirskriftum førir Jákup Petersen fram, at 100 – 140 mió.kr verða søplaðar burtur til onga nyttu í føroyska sjúkrahúsverkinum. Hetta er eitt uppáhald, sum er fullkomuliga skeivt. Tað byggir á eina skeiva samanbering, sum hann hevur gjørt av útreiðslunum í Føroyum og Danmark. Øll niðurstøðan og tær stóru yvirskriftirnar eru burturvið, sum eisini framgongur av talvuni niðanfyri.

Jákup Petersen skrivar, at útreiðslurnar fyri hvønn sjúkling í Føroyum eru 11.458 kr, men tann rætta upphæddin er einans 9.731 kr, sum næstan er tað sama sum í Danmark Munurin er 58 kr. og ikki 2.150 kr. Útreiðslurnar til tað føroyska sjúkrahúsverkið eru uml. 3 mió.kr. hægri enn í Danmark og ikki 100 – 140 mió.kr..

Sí talvu.

Enntá eru fleiri orsøkir til, at lutfalsligu útreiðslurnar í Føroyum burdu verið munandi hægri enn í Danmark:

Útreiðslurnar til bráðfeingis tilbúgving og allar vaktarskipanir á sjúkrahúsunum í Føroyum eru lutfalsliga hægri, tí tað eru færri íbúgvar til hvørt sjúkrahús í einum so lítlum samfelagi.

Landafrøðiliga eru Føroyar fjarðskotnar og hava tí munandi útreiðslur til flutning v.m. í samband við serviðgerð uttanlands.

Primera heilsutænastan í Føroyum er ikki so væl útbygd sum í Danmark. Hetta er m.a. orsøkin til, at sjúklingar liggja longri inni á sjúkrahúsinum.

Hinvegin er ein møgulig orsøk til, at útreiðslurnar í Føroyum kortini ikki eru hægri enn í Danmark, at tað eru færri heilsustarvsfólk fyri hvønn íbúgva í Føroyum. T.d. er talið av serlæknum pr. íbúgva nógv lægri í Føroyum enn í Danmark og flestu norðurlondum.

### 2. Skeiv lóg

Jákup Petersen skrivar, at lógarkarmurin fyri sjúkrahúsvirksemið er Løgtingslóg nr. 89 frá 4. juni 1996. Hetta er ikki rætt. Ein heilt nýggj sjúkrahúslóg varð samtykt í 2005. Lógargrundarlagið hjá sjúkrahúsverkinum er tí Løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005.

Í teirri nýggju lógini er í § 1 staðfest, at tað eru 3 sjúkrahús í Føroyum. Í nýggju lógina er tað sum nakað nýtt lógarásett, at sjúkrahúsini skulu samstarva og veita hvørjum øðrum tænastur, ið kunnu betra um viðgerðartilboðini og raksturin innan sjúkrahúsverkið.

Ógviliga stórar KT íløgur eru hesi seinastu 3 árini framdar, til tess at betra um samskiftið og samstarvið, millum sjúkrahúsini innanhýsis og millum sjúkrahúsini og kommunulæknarnar. Nýggj talgild røntgenskipan og laboratoriuútgerð er tikin í brúk, sum samanbindir heilsuverkið á hesum øki. Taldgilda heilsuskipanin, sum umfatar bæði sjúkrahúsini og kommunulæknaskipanina, er við at vera tikin í brúk.

### 3. Skeivt tal av sjúkrahúsum

Hvar Jákup Petersen hevur tølini frá, um tal av sjúkrahúsum í hinum Norðurlondum, upplýsir hann ikki. Men sambært nýggjastu tølunum frá norðurlendsku hagtalsstovunum yvir talið av vanligum sjúkrahúsum, so eru tølini hjá Jákupi heilt við síðuna av.

Sí talvu.

### 4. Skeiv leiðsla?

Jákup Petersen trívur eisini í sokallaðu DIOS frágreiðingina, sum varð gjørd fyri meiri enn 10 árum síðani um leiðslubygnaðin í føroyska sjúkrahúsverkinum. Orsøkin til, at júst henda frágreiðingin verður drigin fram og ikki onkur onnur, er helst, at nakrir yvirlæknar opinbart halda, at allir trupulleikar høvdu verið loystir, um bert yvirlæknarnir stýrdu sjúkrahúsunum.

So einfalt er tað als ikki. Tvørturímóti er tað soleiðis, at tey sum fáa mest mótstøðu frá hesum somu yvirlæknum, eru læknarnir í leiðslustørvum á sjúkrahúsinum. Í royndum verður eingin leiðsla góðtikin og tað er ein fullkomuligur illoyalitetur móti bæði organisatión og leiðslu í nógvum førum. Tað ber ikki til, at hetta heldur á fram!

Í roynd og veru liggur núverandi leiðslubygnaður á Landssjúkrahúsinum ógvuliga tætt upp at grundtankunum í DIOS-frágreiðingini, men størri rúm er givið fyri røktarøkinum og øðrum fakbólkum. Grundtankin er, at leiðslan skal vera eintýðug og tað fakliga virksemið verða skipað í deplar.

Í tí ovastu leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, sum er eitt tað størsta arbeiðsplássið í landinum, er tað sjúkrahússtjórin, sum hevur tað avgerandi orðið at siga. Fyri at brúka eitt hugtak, sum er betri kent frá størri privatum fyritøkum, kann sigast, at sjúkrahússtjórin er "forstjóri". Tað er sjúkrahússtjórin, sum myndar sjúkrahúsið út eftir og hevur ábyrgdina mótvegis myndugleikunum. Men sjúkrahússtjórin má hava fakfólk afturat sær. Har er tað skilagott at hesi hava

| | Jákup Petersen | Fakta | |
|---|---|---|---|
| **Føroyar 2004** | | | |
| Sjúkrahúsútreiðslur | 550 | 470 | Mio.kr. |
| Íbúgvatal | 48.000 | 48.262 | íbúgvar |
| Sjúkrahúsútreiðslur pr. Íbúgva | 11.458 | 9.731 | kr. |
| **Danmark 2004** | | | |
| Sjúkrahúsútreiðslur | | 52.277 | Mió.kr. |
| Íbúgvatal | | 5.404.523 | íbúgvar |
| Sjúkrahúsútreiðslur pr. Íbúgva | 9.308 | 9.673 | kr. |
| **Munur** | 2.150 | 58 | kr |
| "Meirútreiðslur" í Føroyum íalt | 103 | 3 | Mió.kr. |

*Kelda: Hagstova Føroya, Føroya Gjaldsstova, Danmarks Statistik, Indenrigs- og Sundhedsministeriet.*